# Bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 12.12.2025 kl. 17.00

Á fundi: Janus Thomsen
Poul Laust Christiansen
Jóhannes Liasson Rasmussen
Jónfinn L. Poulsen
Thorstein Thomsen (fyri Otto West)

Ikki møtt: Rakul Mørk
Ronni Hammer

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

Formaðurin bað um loyvi at taka 3 mál við aftrat – játtað og koma á skrá sum nr. 5, 6 og 7.

1. **102-71-2025: Ferðavinnuætlan Hvalbiar Kommuna - uppskot.**

Sambært Kunngerð nr. 110 frá 18. juni 2025 §2, stk.1, skulu allar kommunur í seinasta lagi 31. desember 2025 gera eina ferðavinnuætlan, sum fevnir um alla kommununa. Uppskotið til ferðavinnuætlan fyri Hvalbiar Kommunu er gjørt í samstarvi við Suðuroyar Ferðavinnufelag, lokalum fólki og hagapørtum í sóknini.

**Tekniska nevnd 08.12.2025:**

Nevndin mælir til at strika partin viðvíkjandi kamping, annars er uppskotið góðkent.

**Vega- og havnanevnd 08.12.2025:**

Nevndin hevur ongar viðmerkingar til ferðavinnuætlanina og mælir til, at hon verður góðkend.

**Trivnaðarnevndin 12.12.2025:**

Nevndin mælir til at góðkenna uppskotið til ferðavinnuætlan.

**Avgerð:**

Einmælt samtykt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum og góðkenna uppskotið til ferðavinnuætlan fyri Hvalbiar Kommunu.

2. **102-73-2025: Uppskot til kommunustýrisfundir 2026.**

Sambært uppskotinum, verða fundirnir í fyrru helvt av árinum hildnir mánadagar og í seinnu helvt hósdagar, í báðum førum kl. 16.30.

**Avgerð:**

Samtykt varð einmælt at taka undir við uppskotinum til kommunustýrisfundir 2026.

3. **102-70-2025: Tænastugjald á tóm býli.**

Løgtingslóg nr. 80 frá 02. mai 2025 um tænastugjald á tóm býli, har kommununum verður heim-

ilað at krevja tænastugjald frá eigarum av býlum, har eingin er skrásettur at búgva sambært Landsfólkayvirlitinum. Sambært Kunngerð nr. 149 frá 30. sept. 2025 verður tænastugjaldið fyri 2026 sett til í mesta lagi kr. 7.945,00 fyri hvørt býli.

**Fíggjarnevndin 24.11.2025:**

Samtykt varð einmælt at mæla til, at umsitingin fer undir tilgongdina at fyrireika og leggja tænastugjald á tóm býli við gildi frá 01.01.2026 við hægst loyvda gjaldi.

**Avgerð:**

Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

4. **102-69-2025: Eykajáttan 2025 – 2. viðgerð.**

Samlaða umsóknin um eykajáttan 2025 er kr. 7.995.000,00. Av hesum er eykajáttan til løgur kr. 4.540.000,00, tá ongar løgur vórðu ásettar á fíggjarætlanini fyri 2025 og eykajáttanin til eldrasamstarvið BHS er kr. 1.300.000,00.

Eykajáttanin er fíggjað við tøkum peningi.

**Fíggjarnevndin 08.12.2025:**

Samtykt varð einmælt at mæla til at taka undir við umsóknini um eykajáttan 2025.

**Avgerð:**

Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

5. **102-74-2025: Hoyringarskriv frá H.S. um ískoyti til verandi aliloyvi A-23 á Hvalbiarfirði.**

Upprunin til málið: P/F Bakkafrost Farming hevur ætlanir um at gera tillagingar í verandi aliteigi á Hvalbiarfirði og hevur Heilsufrøðiliga Starvsstovan í hesum sambandi sent kommununi hoyringarskriv og viðkomandi skjøl til støðutakan.

**Tekniska nevnd 08.12.2025:**

Tað er umráðandi, nú økið verður tættari innsiglingarlinjuni, at ringar verða sera væl merktir og hava góð radararefleks og um møguligt ais sendarar á ytstu punktunum. At tað verður tryggjað, at ringar til alla tíð eru væl merktir, so skip og bátar síggja, eisini í myrkri, toku og ringum veðri. Havast skal í huga, at spillvatnið verður leitt út í einum øki eystanfyri Hamranes.

**Vega- og havnanevnd 08.12.2025:**

Nevndin hevur hoyrt seg fyri hjá trolarunum og av tí, at aliøkið verður tættari innsiglingarlinjuni enn áður, so er umráðandi, at ringarnir verða sera væl merktir og hava góð radararefleks og um møguligt ais sendarar á ytstu punktunum, soleiðis at tað verður tryggjað, at ringar og boyur til alla tíð eru væl merkt, so skip og bátar síggja ringarnar og boyur í øllum veðri. Annars er nevndin jalig yvirfyri aliloyvinum og hevur ikki aðrar viðmerkingar.

**Avgerð:**

Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum. Harumframt at lógarkravd frástøða viðvíkjandi fýrlinjuni verður hildin.

6. **102-24-2025: Skriv frá borgarum viðv. trupulleikum av vatni.**
   Vatnsýnisnevndin hevur viðgjørt málið og er komin við sínari niðurstøðu.
   **Tekniska nevnd 18.05.2025:**
   Kommunan skal heita á Landsverk at betra brúnna, so vatnið betri fær runnið frá. Heitast skal á arbeiðsformannin at taka veitirnar upp, sum kommunan eigur at taka upp. Eigarar av ognum, har veitir ikki eru tiknar upp, mugu fáa áminning um hetta. Álagt verður arbeiðsformanninum, regluliga at taka veitina upp niðanfyri træbrúnna.
   **10.12.2025: Tilmæli frá arbeiðsformanninum, Ørvi Norðberg.**
   Mælt verður til at fylgja tilmælinum frá Vatnsýnisnevndini.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt at fylgja tilmælunum frá Vatnsýnisnevndini og Teknisku nevnd.

7. **102-76-2025: Jólapakkatilboð til starvsfólk 2025.**
   Innkomið tilboð frá við Bakkhús Sp/f uppá jólapakkar til starvsfólkið hjá Hvalbiar Kommunu.
   **Fíggjarnevndin 08.12.2025:**
   Einmælt samtykt at mæla bygdaráðnum til at keypa pakka nr. 2.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt at keypa 51 pakkar.

8. **Ikki alment mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 19.10

Janus Thomsen Poul Laust Christiansen Jónfinn L. Poulsen

Jóhannes Liasson Rasmussen Thorstein Thomsen